# BILAR

SAMBAND
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo
tlf. 341800

# Mazda CX-7 til Evropa

**Eftir at hava koyrt í USA í eitt ár er Mazda CX-7 nú klárur til evropeiska marknaðin. CX-7 er ein sonevndur Crossover, sum í fyrstu atløgu kemur við 2,3-litra bensinmotori við 260 hk. Næsta ár kemur eisini ein dieselúgáva**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

CX-7 byrjaði sína tilveru sum konseptbilurin Mazda MX-Crossport fyri umleið tveimum árum síðan, men tá hann seinni hevði heimspremieru í Detroit, var navnið broytt til Mazda CX-7.

Mazda CX-7 er ein sonevndur Crossover - ein kombinatión av fleiri ymiskum biltypum við bæði sportsligum og SUV (Sport Utility Vehicle) eginleikum, ið verður drivin av øllum fýra hjólunum.

Í mun til longdina (467 cm) er CX-7 rættuliga breiður (187 cm), og hæddin er 165 cm. Bilurin er lægri og breiðari enn fleiri av kappingarneytunum, og við lutfalsliga stórari aksilfrástøðu (275 cm) eru koyrieginleikarnir bæði góðir og stabilir. Kabinan er bæði snøgg og sportslig við góðum plássi til fimm vaksin og teirra viðføri.

CX-7 hevur 2,3-litra 4 syl. bensinmotor við 260 hk - sami motorur sum er í Mazda 6 MPS.

Næsta ár kemur eisini ein dieselútgáva. CX-7, ið verða framleiddir í Hiroshima í Japan, fáast í tveimum útgávum hvat útgerð viðvíkur: Advance og Premium.

Í USA fæst eisini ein størri bilur, Mazda CX-9. Hesin kemur sum skilst ikki til Evropa.




*Mazda CX-7 er ein sonevndur Crossover - ein kombinatión av fleiri ymiskum biltypum. Eitt framkomið 4x4 system er standard*



*Kabinan er bæði snøgg og sportslig við góðum plássi til fimm vaksin*




*CX-7 Bilurin er bæði lægri og breiðari enn fleiri av kappingarneytunum við lutfalsliga stórari aksilfrástøðu og stórum 18" hjólum*



*Mazda CX-9 er størri enn CX-7 og verður einans gjørdur til amerikanska marknaðin*